## Enda fótbóltsárið við manér

Ársins fótbóltsveitsla verður í Bowlinghøllini sunnukvøldið 4. Oktober. Sosialurin og Rás2 skipa fyri ársins fótbóltsveitslu í samstarvi við Bowlinghøllina á Hálsi í Havn. Allir spælarar í Vodafonedeildini, 1. deild kvinnum, nevndarlimir, venjarar og hjálparfólk og dómarar eru boðin við til Ársins Fótbóltsveitslu. Hesi kunnu tekna seg til veistluna, við at senda ein teldupost til: fotboltsveitsla@sosialurin.fo, innan mikudagin 1. oktober. Navn og eftirnavn skal viðmerkjast í teldupostinum. Tað er Sosialurin, sum stendur fyri atkvøðugreiðsluni, og tey, sum greiða atkvøðu, eru sum vant liðskiparar og venjarar hjá ymsu feløgunum.



## Gavst eftir ein dyst

Sol Campbell, sum óvæntað skrivaði sáttmála við Notts County í summar, er longu givin í felagnum. Hann spældi bara ein dyst. Tað er annars bert ein mánaður síðani, at Sol Campbell skrivaði undir sáttmála, sum gav honum eina løn upp á knappa hálva millión krónur um vikuna frá nýríka felagnum, sum ætlar sær at kappast við tey stóru um fá ár. Sáttmálin hjá Sol Campbell skuldi verið galdandi fyri næstu fimm árini, men talan gjørdist altso bert um tann eina dystin, tá Notts County leygardagin tapti 2-1 á útivølli móti Moracombe í triðju bestu ensku deildini. Eftir hetta hevði fyrrverandi landsliðsspælarin fingið nokk. Íløgurnar hjá felagnum í nýggjar spælarar vóru ikki tær, sum Campbell helt seg hava fingið lyfti um frá leiðsluni, og týsdagin segði hann endaligt farvæl við felagið.

# Hondbólturin byrjar leygardagin

**Meistarar og steypavinnarar tjóvstarta hondbóltslandskappingina, tá H71 og Neistin hittast longu leygardagin**

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Leygardagin verður farið undir 2009/2010 útgávuna av hondbóltslandskappingini.

Fyrsti dysturin verður longu leygardagin, tá H71 og Neistin hittast. Upprunaliga skuldi dysturin spælast klokkan 16 sunnudagin, men fótbóltsbrakið í Gundadali millum HB og KÍ hevur fingið feløgini at flutt hondbóltsuppgerðina, sum annars vildi staðið í skugganum av fótbóltinum.

Eisini verður ein kvinnudystur leygardagin, tá VB og Neistin hittast í Vági.

Sunnudagin verða aftur fleiri dystir á skránni. Hjá monnum spæla tá Kyndil-StÍF og KÍF-VÍF, meðan tað hjá kvinnum bert er talan um tann eina dystin sunnudagin. Nevnliga tann í Klaksvík millum Stjørnuna og VÍF. Mánadagin spæla Tjaldur og StÍF triðja dystin í fyrsta umfarinum av Sunset-kappingini.



H71 og Neistin hava flutt sín dyst, soleiðis at hesin nú verður spældur leygardagin klokkan 16



Bartal Eliasen verður ikki partur av ÍF-hópinum, sum sunnudagin skal spæla útidyst við Margáir

# ÍF gevur Bartali leikbann

**Eftir hending í dystinum móti HB sunnudagin hevur nevndin í ÍF tikið avgerð um, at Bartal Eliasen ikki verður á vøllinum í dystinum móti EB/Streymi**




Jákup Mørk

Undir dystinum millum ÍF og HB, sum ÍF vann 3-0, var ein hending, sum ikki akkurát var tað, sum sømir seg best á einum fótbóltsvølli.

Bartal Eliasen var á veg av vøllinum til viðgerð eftir harðan stoyt í hornasparksstøðu. Á veg út av vøllinum eru fleiri HB-viðhaldsfólk, sum rópa eftir spælaranum, og í hitanum verður ein ávísur fingur rættur móti HB-viðhaldsfólkunum.

Í tíðindaskrivi staðfestir nevndin í ÍF, at ein spælari sum Bartal Eliasen hevur ein týðandi leiklut sum fyrimynd, og at nevndin ikki góðtekur slíkan atburð á vøllinum. Tí hevur nevndin valt at geva Bartali leikbann til dystin móti EB/Streymi, sum verður nú komandi sunnudag.

Samstundis inniheldur tíðindaskrivið eina umbering frá Bartali Eliasen til HB-viðhaldsfólkini.

# Top-10

Aðra staðni á síðuni skrivað vit um sáttmálan hjá Sol Campbell við Notts County, har samstarvið slitnaði eftir bert ein dyst.

Hetta er tó ikki einasta dømi um sáttmálar, sum rættiliga skkjótt eru slitnaðir, og niðanfyri nevna vit 10 av teimum kendastu.

**1. Dietmar Hamann, Bolton**
Á sumri í 2006 helt Sam Allardyce seg hava gjørt kvettið, tá hann fekk fatur á týska landsliðsspælaranum upp á frían transfer. Sjálvur segði Allardyce, at hetta var besti handilin, sum nakran tíð hevði gjørt, men Hamann var ikki heilt av somu áskoðan. Í øllum førum valdi hann 24 tímar seinni at skifta til Manchester City.

**2. Sol Campbell, Notts County**
Eftir bara ein dyst slitnaði fimm-ára sáttmálin, sum Sol Campbell hevði gjørt við nýríka og høgt satsandi Notts County. Felagið, sum spælir í fjórðu bestu ensku deildini, hevði annars lokkað við eini vikuløn upp á £40.000, men Campbell hevði eisini roknað við, at fleiri aðrir klassaspælarar skuldu koma til felagið. Og tá tað ikki hendi, gjørdi hann av at slíta sáttmálan.

**3. Hameur Bouazza, Sivasspar**
Fyrrverandi Fulham-spælarin skrivaði í august mánaði í ár undir sáttmála við Sivasspor. Men eftir bara ein dyst fyri felagið kom hann eftir, at honum dámdi einki í Turkalandi, og tí boðaði hann felagnum frá, at hann gavst.

**4. David Unswort, Aston Villa**
Verjuspælarin skifti í 1998 frá West Ham til Aston Villa fyri £3 mió, men har kom hann ongan tíð á vøllin. Hann var annars í felagnum í ein mánað, men hann spældi ongan dyst, og fyri sama prís keypti Everton spælaran heima á Goodison Park.

**5. Ali Dia, Southampton**
Graeme Souness helt seg hava gjørt kvettið, tá hann hevði keypt systkinabarnið hjá George Weah at fylla tómrúmið eftir Matthew Le Tissier í Southampton. Talan gjørdist tó bara um 20 minuttir á vøllinum, har Ali Dia ikki sannførdi nakran sum helst, áðrenn Souness skifti hann út. Og síðani er vist eingin, sum hevur sæð nakað serligt til hansara innan fótbóltsheimin.

**6. Christian Vieri, Sampdoria**
Vieir var kendur fyri at skifta felag ofta, men teir 35 dagarnir í Sampdoria vóru toppurin av hesum. Sampdoria hevði annars keypt sterka áleyparan frá Monaco, men góðan mánað seinni var skiftið til Atalanta veruleiki.

**7. Clive Allen, Arsenal**
Arsenal keypti í 1980 evnaríka unglingin fyri £1,25 mió, sum tá var ein ørandi upphædd. Tað gekk tó ikki eftir vild, tí úrslitini stóðu ikki mát við evnini, og eftir tveimum mánaðum í Arsenal varð hann skiftur um við verjuspælaran, Kenny Samson.

**8. Marco Boogers, West Ham**
West Ham keypti í 1995 Boogers fyri £800.000, men hann fekk bara tveir dystir í troyggjuni. Í seinna av hesum dystunum fekk hann reytt kort fyri eina ógvusliga tackling móti Gary Neville, og síðani slapp hann ongan tíð aftur á liðið.

**9. Robert Jarni, Coventry**
Kroatiski verjuspælarin varð í 1998 seldur úr Real Betis í spania til enska Coventry fyri £2,6 mió. Hann spældi tó ongan dyst fyri felagið, men varð ístaðin seldur til Real Madrid fyri £3,35 mió. Ein góður handil hjá Coventry, men í Betis vóru tey ikki blíð, tí teirra ætlan var ongantíð, at spælarin skuldi skifta til Real Madrid.

**10. Robbie Keane, Liverpool**
Liverpool keypti í fjør summar Robbie Keane frá Tottenham fyri £20,3 mió. Talan var tó um eitt vánaligt hálvt ár á Anfield, har Keane ongan tíð beit seg fastan, og í vetrarsteðginum keypti Tottenham spælaran aftur fyri £12 mió. Alt eftir avrikum í Tottenham kann upphæddin tó vaksa til £19 mió.